## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Bjarni Olsen 50:

# Móttøka í Føroya Sparikassa

**Í sambandi við at Bjarni Olsen, stjóri í Føroya Sparikassa, fylti 50 ár mánadagin 13. oktober, var móttøka í Sparikassanum Yviri við Strond hendan dagin**



*Fyrrverandi og núverandi sparikassastjórar, f.v. Jóhan K. Joensen, fyrrverandi sparikassastjóri, føðingardagsbarnið, Bjarni Olsen, sparikassastjóri, og Marner Jacobsen, forstjóri í Sparikassanum*

*Mynd: Maria Olsen*

Nógv fólk vóru komin saman mánadagin 13. oktober til móttøkuna hjá Føroya Sparikassa í sambandi við at annar av stjórunum, Bjarni Olsen, fylti 50 ár hendan dagin.

Bjarni Olsen er útbúgvin Cand. Scient.Oecon. Hann var stjóri á Hagstovu Føroya í 10 ár, áðrenn hann kom til Føroya Sparikassa, har hann gjørdist stjóri í 1999, samstundis sum Marner Jacobsen gjørdist forstjóri.

Bjarni er eisini kendur sum fyrrverandi formaður í Búskaparráðnum og sum skrivari í Fíggingargrunninum.

Teir sum hildu talur á føðingardegnum hjá Bjarna vóru: Tórmund Joensen, næstformaður í nevndini í Føroya Sparikassa, Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa, og Klæmint Olsen, beiggi Bjarna.

Tórmund Joensen segði m.a. at úti í heimi verður ofta tosað um, at nú er hetta ella hatta rákið fyri, hvat ein stjóri skal duga, og hvussu hann eigur at bera seg at, men í síðsta enda er eitt tað mest avgerandi, at ein stjóri er ein heilur persónur, at hann dugir at formidla og lurta. Og júst hesa fyrimynd, um vit so kunnu siga, halda vit í nevndini, at tú Bjarni - við tínum blíða og opna sinnalagi - livir sera væl upp til.

Marner Jacobsen segði m.a. at tað sigst, at hvørt ártíggju hevur sína charmu - og nú hevur Bjarni rundað tey fyrstu 5 ártíggjuni, og fer nú inn í sítt 6. ártíggju. Hyggja vit eftir, so er ikki so lítið komið av skaftið.

Vit í Sparikassanum kenna teg, Bjarni, sum vinaligan og dugnaligan - tú hongir teg ikki í detaljur, og hevur altíð familjuna og starvsfólkini fremst í huganum. Yvirhøvur hevur tú fyrst og fremst áhuga fyri menniskjum. Ættarbond hava tín stóra áhuga, og minnið hevur tú sum fáur. Og tá tað kemur til at kenna fólk, ert tú sum tikin úr leikum. Hetta eru alt eginleikar, ið eru sera góðir í tínum starvi og við tínum ábyrgdarøkjum.

Beiggi Bjarna, Klæmint Olsen, var tann sum kendi hann best, og segði hann frá barnaárunum, og øllum tí teir høvdu havt saman.

Umleið tvey hundrað fólk vóru til móttøkuna í Sparikassanum.



*Bankastjórar tosa saman, f.v. Marner Jacobsen saman við Jørn Astrup Hansen og Janus Petersen, stjórum í Føroya Banka*

*Mynd: Maria Olsen*



*Familjan var eisini við til móttøkuna, f.v. Bjarni Olsen, konan, Berit, og dóttirin, Doris Helena, og synirnir Árni Karstin og Høgni Janus*

*Mynd: Maria Olsen*



*Per Aakjær, Kirstin Jacobsen og Bjarni Olsen*

*Mynd: Maria Olsen*



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Sunnvá Christiansen 50 ár í Gamla Bókhandli



Í dag eru liðin fimmti ár síðani, at Sunnvá Christiansen í Havn byrjaði sum krambakvinna í Gamla Bókhandli í Havn – 14 ára gomul og júst liðug við skúlan.

Sunnvá er dóttir Edvard og Biritu Lindenskov í Havn. Hon var gift við Terja Dal-Christiansen, sum doyði í november 2000, og áttu tey børnini: Rosu Bergittu, Kára, Sofus og Hans Áka.

Meginpartin av sekstiárunum búðu Sunnvá og Terje í Danmark, men so skjótt tey fluttu heimaftur, fór Sunnvá aftur í Bókhandilin at arbeiða – og hevur starvið í bókhandlinum verið hennara lívsstarv – hon hevur ikki verið aðrastaðni.

Sum barn var Sunnvá von at koma í húsið hjá Hans í Bókahandlinum og Kate, ommusystirin í Nýggjustovu var vermóðir Hans, so tann kendskapurin hevur kanska gjørt sítt til, at hon á sinni kom í Bókhandilin.

Og tey, sum eru von at keypa í Gamla Bókhandli kunnu eisini sanna, at krambakvinnurnar har eru týdningarmikil partur av ímyndini av hesum gamla handlinum í søguríka gamla real- og læraraskúlanum.



## Petur á Hvítanesi 90 ár

Leygardagin 11. oktober fylti Petur Danielsen, vanliga nevndur Petur á Hvítanesi, í Havn 90 ár.

Petur er av Hvítanesi, foreldrini vóru: Inga, f. Joensen, ættað av Sundi, og Dánial Danielsen, vanliga nevndur Dánial á Hvítanesi. Familjan flutti til Havnar at búgva, tá Petur var um 15 ára aldur.

Petur sigldi frá ungum av. Hann er útbúgvin skipari og førdi fleiri skip sum t.d. Hvítanes, sum hann sjálvur var partaeigari í. Hann mátti gevast at sigla tá eyguni fóru at bila, hann var tá umleið 60 ára gamal.

Petur giftist við Signhild, f. Rasmussen, av Skála, dóttir Rakul, f. Joensen, ættað av Skælingi, og Palla Rasmussen, vanliga nevndur Skála Palli.

Signhild og Petur fingu fýra børn: Dánial Paula, sum doyði í 1994, 57 ára gamal, Regin, Janu, og Petur, sum doyði í 1995, 46 ára gamal.

Tey eiga 11 ommu- og abbabørn og 26 langommu og langabbabørn

Signhild og Petur hava búð við Grønlandsvegin í Havn, men fyri umleið tveimum árum síðan fluttu tey bæði inn á Sambýlið, Oman Hoydalar 6 í Hoyvík, at búgva.

Hóast høgan aldur er Petur væl fyri og fylgir væl við tí sum fyriferst rundan um hann og í samfelagnum sum heild.

## Dagurin

**15. oktober. Heiðveig**, deyð í 1243. Hon var greivadóttir úr Bayern og giftist hertoganum Heinriki I í Slesiu. Bygdi fleiri sjúkrahús og kleystur. Gav seg sjálv í nunnukleystur, har hon doyði. Varð skírd halgikvinna í 1267.

Heiðveig er føroyska navnið fyri Hedvig.

Upprunaliga týskt, samansett av tveimum orðum, sum merkja *stríð* og *víggj*.

## Minningarorð um elskaðu konu, mammu, vermammu og ommu okkara

# Naina Soll

## Sørvágur

### f. 27. desember 1948 - d. 31. august 2003



*Saknið tungan harmin vekur*
*at so dátt vit mistu teg,*
*Harrin gevur, Harrin tekur,*
*ei vit skilja Harrans veg;*
*ei á foldum finnist tann,*
*lívsinsgátu grunda kann;*
*Best sum sólin fagrast skínur,*
*deyðin inn um dyrnar trínur.*

Hesi orð fingu vit av sonnun at sanna, tá tú so bráðliga var tikin frá okkum. Eftir sita vit spyrjandi við longsli og sorg í hjarta. Hví skuldi Várharra taka teg frá okkum nú, hví kundi tú ikki vera her hjá okkum longur? Svarið uppá hendan spurning fingu vit í kirkjuni, tá ið prestur helt andakt yvir tær; "Hennara stríð er at enda komið". Eftir sita vit við ugganum av hesum orðum, tú mátti sleppa heim til títt hvíldarstað, tí títt stríð var at enda komið og nú hevur tú enduliga fingið hvíld frá allari sjúku og sorg - og tað hevur tú so sannuliga uppiborið.

Líkamikið hvussu sjúk tú enn var ella hvussu stormar á teg leiktu, so hevði tú altíð tíð til okkum, og vart tú eisini altíð klár við eini hjálpandi hond. Altíð tókst tú øll onnur fram um teg sjálva, og líka mikið hvussu nógv varð lagt á tínar herðar, so gavst tú aldrin upp, men tolin stríddist tú ímóti øllum, sum var lagt á herðar tínar. Fáur man tann vera, sum hevur borið so nógv sum tú og hóast tað megna at kempa og yvurvunnið so nógv og samstundis haft yvirskot og orku til at ugga og troysta okkum onnur.

Saknurin er stórur eftur teg, og eitt tómrúm er nú eftir sum aldrin aftur verður fylt, tí eingin og einki kann taka títt pláss. Eftir hava vit minnini og tey eru mong og góð. Tú hevur sannuliga lært okkum aldrin at geva upp, tí vit fáa ikki meira at bera enn vit megna, tað er tó léttari sagt enn gjørt, men betur lærumeistara enn júst teg kundu vit aldrin fingið. Títt pláss er tómt, men ikki kalt. Vit vita at tú enduliga ert komin heim til tín einglaflokk, og tú vekir yvur okkum, eins og tú gjørdi her á fold.

Saknurin er eisini stórur hjá Niels og Karl, nú teir hava mist ommu sína, og tað er ikki lætt. Nógvir spurningar koma um hvar Nain-omma er, og um hon kemur aftur og hjá lítlum børnum er tað ikki lætt at skilja, eins og vit vaksnu ikki heldur skilja alt. Tú vart ein góð og kærleiksfull omma, sum altíð hevði tíð til tínar lítlu einglar - ofta gloymdi tú alt rundan um teg, og tað sást hvussu tú lívgaðist upp, tá ið Niels og Karl komu út til Sørvágs. Altíð vart tú klár at vera dadda og gleddi tú teg eisini nógv til at blíva omma aftur í januar, at tú ikki skuldi vera her og uppliva tað saman við okkum, droymdi eingin av okkum um, men tú hyggur stolt niður til okkara, tá tann dagur kemur.

Ja, ikki ert tú longur okkara millum, men tú ert farin heim til Várharra og heim til tey kæru, sum tú misti her á fold. Men vit vita, at vit aftur ein dag skulu hittast og tá vil hvørki sorg ella myrkur okkum raka.

Vit vilja siga tær takk fyri alt tú vart fyri okkum, takk fyri tín kærleika og takk fyri alt tú hevur lært okkum. - Vit síggjast aftur ein dag.

*Kæra barnið, vit tær siga*
*várt farvæl á síðstu ferð,*
*uggast vit tó inniliga,*
*tú nú ein Guðs eingil er,*
*Sum til Guðs er komin heim*
*millum einglafjølda gleim,*
*har vit aftur skulu finnast*
*ævinliga har at ynnast.*

Við hesum orðum lýsa vit frið yvir minni um elskaðu konu, mammu, vermammu og ommu okkara.

**Kalle, Annika og John-Heri**
**v/ familju**